


*Føroyar er langt aftanfyri, tá tað kemur til trygd og arbeiðsumhvørvi, men vit eru á rættari leið, sigr Svein Rógvi Nielsen, sum er við til at finnna Ársins arbeiðspláss*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ársins arbeiðspláss verður nú kosið

**Í morging ella fríggjadagin verður Ársins arbeiðspláss funnið, og í finaluni eru Tavan í Leirvík, Fiskavirkið í Gøtu og Føroya Fiskavirking í Miðvági**

ARBEIÐSUMHVØRVI
*Marjun Dalsgaard*

Arbeiðið við at finna Ársins arbeiðspláss er nú við at verða liðugt, men enn er ikki greitt um tann stóri dagurin, har vinnarin skal almannakunngerast, er í morgin ella fríggjadagin – Tað velst um hvør vinnarin er, greiðir Svein Svein Rógvi Nielsen frá. Tvey av virkjunum eru stongd fríggjadagin, so um so er, at vinnarin finnist millum tey bæði, verður úrslitið almannakunngjørt í hósdagin, so møguligt er hjá fjølmiðlunum, at vitja tey, sigur hann.

Í finaluni eru eru Tavan í Leirvík, Fiskavirkið í Gøtu og Føroya Fiskavirking í Miðvági. Tvey av hesum hava haft trupuleikar við Arbeiðseftirlitinum, men nú er trygdin í topp, sigur Svein Svein Rógvi Nielsen.

Hann fekk hugskotið til at finna ársins arbeiðspláss, tá hann var við til eitt líknandi tiltak í Danmark, sum SID stóð fyri. Hann helt, at tað eisini átti at verið gjørt í Føroyum. Tískil spurdi hann vegleiðara sín á Tekniska Skúla í Havn, har hann lesur framleiðslutøkni, um hann kundi gera eina líknandi kanning av virkjum í Føroyum, sum part av endaligu uppgávuni.

## Hava betrað um umhvørvið

Tey trý virkini, sum eru vald í finaluna, eru vald við tveimum grundgevingum. Onnur er, at tey eru væl fyri fíggjarliga – hetta verður mett sum týdningarmikið, tí tað førur viå sær, at starvsfólkið kennur seg trygt. Hin er, um virkini hava gjørt nakað serligt fyri at betra um arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum.

Tavan í Leirvík bleiv millum annað vald, tí her hava tey sett ein fysioterapeut, ið mýkjur vøddarnar hjá starvsfólkunum tvær ferðir um vikuna. Fiskavirkið í Gøtu hevur flutt fiskalinjurnar fyri at betra um arbeiðsstøðuna hjá starvsfólkunum, og á Føroya Fiskavirking í Miðvági hava starvsfólkini fingið arbeiðsborð, ið kunnu hevjast og lækkast, hetta eisini fyri at betra um arbeiðsstøðina hjá teimum.

Nú virkini eru komin í finaluna, verður Ársins arbeiðspláss funnið við hjálp av spurnarbløðum, sum starvsfólkið á virkjunum, hava svara uppá. Hetta eru spurningar um, tey kenna seg trygg, um tey hava arbeitt har leingi, um nøkur viðurskiti áttu at verið annaleiðis og so framvegis.

## Verkfallið órógvaði

Svein Rógvi Nielsen er ikke heilt nøgdur við mannagongdinia. Hann vildi fegin havt tíð til at vitja øll virkini, sum høvdu meldað seg til kappingina. Tað hevur ikki verið møguligt, tí umfatandi verkfallið byrjaði dagin eftir, at hann hevði sent brøv út til fyritøkurnar, har hann bjóðaði teimum at vera við í kappingini. Virkini lógu still og tey komu tískil ikki víðari við arbeiðinum, fyrr enn verkfallið var av.

Svein Rógvi Nielsen heldur, at tað er umráðandi, at mannagongdin verður annaleiðis eina aðru ferð, tí vitjanin á virkjunum er tað, sum hevur verið mest gevandi í hesum arbeiði, metur hann í dag.

- Tað er ikki, fyrr enn tú kemur út til virkini, at tú fær nakra hylling av, hvat verður gjørt fyri arbeiðsumhvørvið. Eg havi verið bilsin yvir, at so nógv varð hugsað um arbeiðsumhvørvið á virkjunum, tí eg var sera negativur áðrenn, sigur Svein Rógvi Nielsen. Hann sigur, at trygdin á teimum virkjunum, sum eru í finaluni, er hundrað prosent, og at arbeiðsgevararnir hugsað meira um trygd, enn hann hevdið væntað.

- Tað er møguligt, at vit høvdu fingið eina aðra fatan av øðrum virkjum í Føroyum eisini, tí tað vísur seg so, at leiðararnir á teimum virkjunum, sum vit hava vitja, gera sær tankar um trygdina og arbeiðsumhvørvið – eg haldi tað er sera keðiligt, at vit ikki fingu vitjað hini, sigur hann.

Sum heild eru starvsfólkini á hesum virkjum glað fyri at vera har, men eru ónøgd við nøkur viðurskifti, sum ganga í gjøgnum á øllum trimum arbeiðsplássum.

- Tey flestu siga, at einsháttað og tungt arbeiði eru viðurskifti, sum tey eru ónøgd við. Tað, ið kann gerast, er at flyta fólk runt í framleiðsluni, so tey gera ymiskt arbeiði, men ofta hevur arbeiðsgevarin ilt við at flyta tann skjótasta skeraran eitt annað stað - tað er eisini væl skilligt, at teir hugsa um, at tað skal ganga væl og skjótt, sigur hann.

## Føroyar aftanfyri

Sum heild eru føroysku fyritøkurnar langt aftanfyri, tá talan er um arbeiðsumhvørvi.

- Í mun til aðra staðni, verður slett ikki hugsað í hasum banunum, sigur Svein Rógvi Nielsen. Hann heldur tó, at tað er við at broytast, hóast tað enn finnast arbeiðspláss, har leiðslan er líkaglað.

- Leiðsluni væntar ráðgeving og vegleiðing, og møguliga er heldur ikki so nógvur peningur í føroysku virkjunum, som eitt nú teimum donsku. Arbeiðseftirlitið er ein ráðgevandi stovnur, men har eru trý fólk og arbeiðsbeiðsbyrðan eigur at vera stór, sigur Svein Rógvi Nielsen. Hann væntar ikki, at nøkur av teimum fyritøkunum, sum eru komnar í finaluna um Ársins arbeiðspláss, hevði vunni í Danmark, men tó er tað sera týdningarmikið, at hendan kappingin heldur fram.

- Nú hava vit svarini frá starvsfólkunum, og tankarnar hjá leiðsluni, og næsta ár hyggja vit eftir, um tað er gjørt, sum starvsfólkið hevur eftirlýst, og sum leiðslan hevur sagt seg vilja gera, sigur Svein Rógvi Nielsen. Hann vónar, at um kappingin um at verða Ársins arbeiðspláss gerst eitt afturvendandi tiltak, vil tað eggja virkjum at gera nakað fyri arbeiðsumhvørvið og trygdina á arbeiðsplássinum.

### Um kappingina

**Um kappingina**
Fyri at vera við í kappingini um ársins arbeiðspláss á ár, skuldi fyritøkan hava minst 25 starvsfólk, og arbeiðið verða merkt av at vera fysiskt aktivt. 20 fyritøkur meldaðu seg til kappingina. Tríggjar vórðu valdar út og starvsfólkini á hesum fyritøkum fingu eitt spurnarblað við 16 spurningum. Út frá hesum spurnarbløðum verður Ársins arbeiðspláss funnið.

**Dómsnevndin:**
Í dómsnevndini, sum skal finna ársins arbeiðspláss eru Sakaris Hansen fyri Havnar arbeiðsmannafelag, Hanna Isaksen fyri Klaksvíkar arbeiðsmannafelag, Ingeborg Vinther fyri Føroya arbeiðarafelag, Kristoffur Olsen fyri Klaksvíkar arbeiðsmannafelag, eitt umboð fyri Rasmussen & Weihe, og Svein Rógvi Nielsen.



# Norska konsulátið aftur hjá Advokatfelagnum

**Týsdagin tók Petur Even Djurhuus, advokatur, við sum norskur konsul í Føroyum. Fram til 1995 røktu advokatar hjá Advokatfelagnum starvið, sum Finn Christiansen hevur røkt seinastu átta árini**

KONSUL
*Eirikur Lindenskov*



*Finn Christiansen og konan, Margreta saman við Petur Even Djurhuus og konuni, Ninu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinnapartin týsdagin tilnevndi Dagfinn Stenseth, norskur sendiharri í Danmark, Petur Even Djurhuus, sakførara í Havn til nýggjan norskan generalkonsul í Føroyum.

Petur Even Djurhuus loysti av Finn Christiansen á Argjum, sum hevur røkt konslastarvið síðani 1995. Av tí at Finn Christiansen hevur latið upp egið ráðgevaravirki, Atlantic Marine Surveyors, hevur hann ikki stundir at røkja konslastarvið, tí hann fær ikki havt skrivstovuna opna allar fimm yrkadagarnar í vikuni, og tá fær hann ikki røkt starvið til lýtar, sigur hann.

Í sambandi við tilnevningina av nýggja konslinum var samkoma í Norðurlandahúsinum seinnapartin týsdagin, har væl av fólkið var komið saman – har vóru teir flestu av teimum 13 konslunum í landinum, løgmaður, onkur landsstýrismaður og annars fólk, ið hava eitthvørt tilknýti til nýggja og fráfarna konsulin.

Dagfinn Stenseth, norski sendiharrin í Keypmannahavn, nevndi í røðu síni tætta sambandið millum Føroyar og Noreg – og hann helt fyri, at konsulátið í Føroyar man vera eitt tað týdningarmesta konsulátið. Hann segði, at arbeiðsuppgávurnar hjá konslunum vóru broyttar seinnu árini, og at tað nú meira snúði seg um at verða ein forlongdur armur hjá norsku stjórnini inn í føroyska samfelagið, vinnulívið, mentantarlívið og fjølmiðlarnar.

Petur Even Djurhuus takkaði eisini fyri heiðurin. Hann nevndi eisini tætta sambandið millum Noreg og Føroyar – og at Noreg er tað av londunum, sum Føroyar longst hava havt ríkisfelagsskap við. Skemtandi nevndi hann eisini uppgávuna hjá norsku umboðs- og sendimonnum í Føroyum í fyrndini, tá kongur sendi fólk til Føroya at krevja skatt, og tá hin fyrsti teirra varð avrættaður av føroyingum úti á Tinganesi fyri eini 1000 árum síðani. Hann helt tó ikki, at hann fór at fáa somu uppgávu sum teir: At krevja inn skatt í Føroyum til norska kongin.

Petur Even Djurhuus er advokatur og partnari í Advokatfelagnum yvir við Strond í Havn.

Hann fegnaðist eisini um, at norska konsulátið aftur var í hesum advokatfelag, har tað annars hevur verið í so mong ár.

Fyrst var tað Throstein Petersen, sum stovnaði Advokatfelagið, ið var norskur konsul – m. a. var tað undir krígnum, tá sera nógv var at gera – so nógv, at tey í heilum máttu steingja advokatskrivstovuna fyri at røkja konslauppgávurnar. Nógv norsk flóttarfólk vóru í Føroyum undir krígnum, og teimum mátti konsulátið taka sær av.

Eftir Throstein Petersen var tað Leif Waagstein, sum var konsul, og eftir hann Dánjal Magnussen. Síðani 1995 hevur Finn Christiansen røkt starvið.



*Dagfinn Stenseth, norski sendiharrin í Keypmannahavn, handar Petur Even Djurhuus diplomið uppá, at hann er norskur konsul í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Petur Even Djurhuus saman við pápanum, Tórmóði Djurhuus, sum eisini er advokatur, mammuni, Bysse Djurhuus, og ommunu, Hjørdis Djurhuus, sum er 93 ár. Hon var kona Hákun Djurhuus, fyrrverandi løgmanni og formanni Fólkafloksins í mong ár*

*Mynd Jens Kristian Vang*

## Heiðaraður av Haraldi kongi V

**Haraldur kongur V av Noreg hevur heiðrað Finn Christiansen, við »Den Norske Fortjenestemedalje af første klasse« fyri starvið sum norskur konsul seinastu átta árini**

KONSUL
*Eirikur Lindenskov*

Sum tøkk til Finn Christiansen, sum hevur verið norskur konsul í Føroyum síðani 1995, bar Dagfinn Stenseth, norski sendiharrin í Danmark, honum tvær fornemmar heilsanir úr Noreg, onnur eitt takkarbræv frá Jan Petersen, uttanríkisráðharra Noregs, og hin frá Haraldi Kongi V, ið hevur givið honum »Den kongelige Norske Fortjenestemedalje af første klasse«.

Norska konsulátið í Føroyum hevur eitt sindur hægri heimildir, enn konsulátini flest. Eitt nú kann generalkonsulin í Føroyum útskriva pass – og tað kann eingin av hinum konslunum. Av tí at norsku passreglarnar eru broyttar soleiðis, at børn hjá norskum ríkisborgarum skulu hava síni egnu pass, hevur nógv verið at gjørt við at útskriva pass seinastu tíðina. Seinasta árið hevur Finn Christiansen útskrivað eini 35 pass – tann yngsti, ið fekk pass, var eitt nakrar vikur gamalt barn



*Dagfinn Stenseth, sendiharri Noregs í Danmark, gevur Finn Christiansen heiðursmerkið frá Haraldi kongi*